


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

*www.sosialurin.fo*

# Eingin sensatión

*Men verandi meistararnir úr Madrid høvdu stórar trupulleikar og Rosenborg heldur fast um norðurlendsku oddastøðuna*

JÁKUP MØRK

Hetta er í høvuðsheitum niðurstøðan eftir at fyrsta umfar í fyrra bólkaspælinum í meistarakappingini varð leikt.

Serliga var tað dysturin millum Sportin Lissabon og Real Madrid, har eitt óvæntað úrslit lúrdi, eftir at Real í hálvleikinum var aftanfyri við tveimum málum. Tað eydnaðist tó meistarunum at koma aftur í aftur við hjálp av einum Carlos-frísparki og einum sjálvmáli.

**Rosenborg heldur fast**

Seinnu árini hevur norska Rosenborg verið nógv fremsta norðurlendska lið í europeiskum høpi, og hetta varð enn einaferð staðgfast.

Rosenborg vann 3-1 á Paris St. Germain, tó at fraklendingarnir eitt skifti vóru á odda.

Hitt norðurlendska liðið, Helsinborg úr Svøríki, mátt á heimavølli lúta 3-1 fyri Bayern München, sum annars telist millum favorittarnar at vinna kappingina.

Annars er vert at leggja til merkis, at Juventus var í alstórum trupulleikum móti Hamburg, meðan Manchester United og Barcelona sýndu nærum ræðandi styrki.

Niðanfyri eru prentað úrslitini av dystunum.

**Bólkur A**

**Spartak Moskva-Bayer Leverkusen 2-0 (0-0)**
1-0: Yegor Titov 51
2-0: Artyom Bezrodnyi 89

**Sporting Lissabon-Real Madrid 2-2 (2-0)**
1-0: Sa Pinto 38
2-0: Cruz 42
2-1: Carlos 50
2-2: sjálvmál 69

**Bólkur B**

**Shakhtar Donetsk-Lazio 0-3 (0-1)**
0-1: Lopez 29
0-2: Nedved 70
0-3: Inzaghi 80

**Sparta Prag-Arsenal 0-1 (0-1)**
0-1: Silvinho 33

**Bólkur C**

**Olympic Lyon-Heerenven 3-1 (2-1)**
1-0: Anderson 2
2-0: Anderson 9
2-1: Talan 35
3-1: Marlet 58

**Valencia-Olympiakos 2-1 (2-0)**
1-0: Baraja 36
2-0: Alonso 44
2-1: Djordjevic 73

**Bólkur D**

**Galatasary-AS Monaco 3-2 (2-0)**
1-0: Jardel 17
2-0: Hagi 29
2-1: Nonda 50
2-2: Simone 62
3-2: Capone 80

**Glasgow Rangers-Sturm Graz 5-0 (3-0)**
1-0: Mols 9
2-0: de Boer 19
3-0: Albertz 29
4-0: Van Bronckhorst 71
5-0: Dodds 85

**Bólkur E**

**Panathinaikos-Deportivo La Coruna 1-1 (1-0)**
1-0: Warzyca 29
2-0: Naybet 84

**Hamburg SV-Juventus 4-4 (1-2)**
0-1: Tudor 5
1-1: Yeboah 17
1-2: Inzaghi 36
1-3: Inzaghi 52
2-3: Mahdavikia 65
3-3: Butt (br.) 72
4-3: Kovac 82
4-4: Inzaghi (br.) 88

**Bólkur F**

**Helsinborg-Bayern München 1-3 (0-1)**
0-1: Scholl 7
0-2: Salihmidzic 48
0-3: Jancker 55
1-3: Johansen 90

**Rosenborg-Paris St. Germain 3-1 (1-1)**
0-1: Christian 7
1-1: Berg 17
2-1: Johnsen 62
3-1: Skammelsrud (br.) 90

**Bólkur G**

**Manchester United-Anderlecht 5-1 (3-0)**
1-0: Cole 15
2-0: Irwin (br.) 304
3-0: Sheringham 41
4-0: Cole 49
4-1: Koller 54
5-1: Cole 71

**PSV Eindhoven-Dynamo Kiev 2-1 (1-1)**
0-1: Shatskikh 6
1-1: Lucius 39
2-1: Bruggink 52

**Bólkur H**

**AC Milan-Besiktas JK 4-1 (3-1)**
0-1: Havutcu (br.) 20
1-1: Coco 36
2-1: Bierhoff 44
3-1: Schevchenko (br.) 45
4-1: Schevchenko 77

**Barcelona-Leeds United 4-0 (2-0)**
1-0: Rivaldo 10
2-0: de Boer 29
3-0: Kluivert 74
4-0: Kuivert 84

# Til venjaran og 1. Deild kvinnur hjá KÍ

*Greinin í Norðlýsinum er ósonn*

Vit NSÍ-kvinnur og venjari mugu heldur taka til allar viðmerkingarnar, sum vit hava fingið síðani dysturin ímóti KÍ skuldi leikast.

Alt byrjaði á Ólavsøku, tá ið tann fyrri dysturin skuldi leikast, tá ringdi venjarin hjá KÍ til venjaran hjá NSÍ og bað NSÍ útseta dystin, tí tær vóru á Ólavsøku.

(Kelda : KÍ-spælari ) Hetta skulu vit í NSÍ svíða fyri, og tað er á sera lágum støði.

So til tann seinna dystin, har ið NSÍ genturnar ikki fingu mannað lið.

Klokkan 19.00 fríggjakvøldið fekk KÍ-venjarin "sum sat í NSÍ-hølinum " at vita at NSÍ ikki fekk mannað lið vegna skaða. Hann noktaði at útseta dystin, tískil var ringt til nevndina hjá KÍ, har vit fingu játta at útseta dystin.

Klokkan 21.00 sama kvøldið fingu vit at vita frá KÍ-venjaranum, at tað var ongin møguleiki til tess.

Vit góðtóku at útseta tann fyrra dystin við tí í hyggju at skapa ein góðan sportligan fótbóltsanda og tað kann koma fyri hjá øllum liðum at man ikki fær mannað lið, eisini KÍ.

Hóast tað næstniðasta liði vinnur óvantað á steypavinnarunum 2000, so sømir tað seg ikki at koma við slíkum ákærum í fjølmiðlunum.

Men man má siga at tá steypavinnarnir 2000 gera slíkt, so leggja tær støðið í fótbóltinum.

Vit halda at um nakar skal fáa ákærur hesum máli viðvíkjandi, má tað verða KÍ venjarin, tí at hann visti av øllum frammanundan.

Hervið takka vit fyri eitt "gott og sportligt kappingarár" og ynskja VB-kvinnunum hjartaliga tillukku við 6-0 sigrinum á KÍ fríggjakvøldið 08.09.00.

Vegna NSÍ kvinnurnar
Mortan Hansen
venjari

# Hondbólturin aftur í gongd

*Sunnudagin skipar hondbóltsfelagið Kyndil fyri hondbóltskapping, har fýra tey fremstu liðini frá undanfarna kappingarári fara at royna styrki sína*

JÁKUP MØRK

Hondbóltskappingin stendur sum kunnugt fyri framman, og sum vera man, royna liðini nú at pussa formin av, áðrenn stigini av álvara fara at telja.

Ein trupulleiki hjá feløgunum hevur ofta verið, at ov fáir venjingardystir fáast í lag, og tí hevur við jøvnum millumbilum verið roynt at skipa fyri kappingum av ymsum slag.

Sunnudagin stendur so ein av hesum fyri framman, tá Kyndil skipar fyri kapping, har fýra tey fremstu mansliðini frá undanfarna kappingarári taka lut.

Umframt Kyndil, sum í fjør gjørdist nr.fýra, er talan um føroyameistararnir úr Neistanum og VÍF og StÍF, sum gjørdist ávíkavist nr. tvey og trý.

**Tveir dystir til hvønn**

Lagt verður fyri kl. 14.00, tá silvur- og bronsuvinnararnir spæla, og síðani verður hildið á út í eitt, til kappingin er liðug.

Á leið kl. 15.15 spæla Neistin og Kyndil, og er tá funnið fram til, hvørji lið skulu spæla finaludystin. Áðrenn hesin verður leiktur, skal tó eisini dystast um triðja plássið.

Sostatt verður talan um einar fimm tímar, har liðini bæði fáa tveir dystir á part.

Umframt at vera ein kapping, har liðini fáa eitt sindur av dystarvenjing, fer kappingin allarhelst eisini at geva eina ábending um, hvussu væl ymsu liðini er fyri hetta kappingarárið.




*Kyndil og VÍF teljast bæði millum gullbiðlarnar í ár, og sunnudagin fæst helst ein ábending um, hvussu væl tey eru fyri, nú kappingin stundar til*




# Missiónsstevna



**Jørn Hyldgaard lei›ari í Troens Ord í Brande talar**

**Í døgnum 15., 16. og 17. september** hevur samkoman Rhema vitjan av pastor Jørn Hyldgaard úr samkomuni Troens Ord í Brande, og ver›a møtini hesi:

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjakvøldi› | kl. 20 | Missiónsmøti |
| Leygardagin | kl. 10-12 | Opin lei›arafundur |
| | kl. 20 | Missiónsmøti |
| Sunnudagin | kl. 11 | Morgunmøti v. sunnudagsskúla |
| | kl. 18 | Missiónsmøti |

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

*Samkoman Rhema*




# E- business - Hvat skal til?

**Málbólkur:**
Skeiðið er ætlað fólki, sum leita sær vitan um E-business, fyri at tey betur kunnu taka støðu til hetta nýggja hugtakið. Skeiðið gevur eina mynd av menningini innan teldur og E-business higartil og viðger hvørjir møguleikar og vansar liggja í E-business.

**Skeiðinnihald:**
Hesi evni verða viðgjørd á skeiðinum:
- Eitt sindur um Internetið
- Hvat er E-business og tann nýggi búskapurin
- Ættarliðini innan E-business
- Førleikakrøv til deildir og starvsfólk
- Marknaðartreytirnar á Internetinum
- E-business í verki
- Marknaðarføring, innkeyp, tænasta, distributión á Internetinum
- Royndir úr Føroyum
- E-business og virkisbygnaðurin
- Kjarnukompetansan og outsourcing
- Trygdin við gjaldskortum
- Góðskumerkingar innan E-business

E-business er nógv frammi í tíðini. Umráðandi er hjá fyritøkum og stovnum at seta seg inn í hetta umfatandi øki, tí ongin ivi er um, at E-business kemur at hava kollveltandi ávirkan á framtíðar handilslívið - eisini í Føroyum.

Eftir skeiðið er skeiðluttakarin førur fyri at meta um hvussu hansara virki/stovnur skal brynja seg til í E-business. Skeiðluttakarin hevur fingið eina gjøgnumgongd av teimum lutum, sum eru við til at mynda E-business.

**Dagur:** 8. oktober 2000 frá kl. 09.00-15.30
**Skeiðleiðari:** Steinbjørn í Dali
**Kostnaður:** Kr. 1.600,- fyri hvønn, íroknað er frálæra, tilfar og matur.
**Tilmelding:** Áðrenn 4. oktober 2000

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo

# Porkeris Kvøldskúli 2000/2001

| Lærugrein | Tíð | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|---|
| Hondarbeiði | tórsd. 19.30-22.30 | Sonja Frederiksen | 373740 |
| Træsmíð | tórsd. 19.00-22.30 | Mannbjørn Olsen | 373864 |
| Telduskeið | eftir avtalu | Bent Albinus | 374033 |
| Postalíns-máling | eftir avtalu | Irena Remmer | 373587/ 383185 |
| Seyming | eftir avtalu | Anna A. Poulsen | 373829 |
| Orgulspæl | mánad. 19.00-20.40 | Jógvan Midjord | 373275 |

Øll skeiðini eru treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna.

Luttøkugjaldið verður goldið fyrsta kvøldið og tað er 300,- kr. fyri hvørt skeiðið, tó 200,- kr. fyri teldu og orgulspæl.

Tilmelding hjá lærarunum áðrenn 1. oktober.

**Porkeris Kvøldskúli**
**Tlf. 37 31 85**

**Sjavs**

Sjavskapping verður í Felagslonini fríggjakvøldið 15. september kl. 19.30.

**Fuglafjarðar Pensionistafelag**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

# Bakaralærlingur

**Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta áhuga so ring ella skriva til:**

**P/f Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**100 Tórshavn**
**Tel. 31 10 60**

frants restorff